# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo


## Fyrrverandi B36'ari fingið sáttmála í Onglandi



Hereford United, sum spælir í fjórðbestu ensku fótbóltsdeildini, hevur gjørt sáttmála við álopsspælara, sum áður hevur skotið mál fyri B36. Hereford United er professionelt fótbóltsfelag, sum komandi kappingarár skal spæla í League Two. Nú hava teir gjørt sáttmálar við tveir nýggjar spælarar, og annar teirra er 22 ára gamli bretin Sam Malsom, sum áður hevur spælt fyri B36. Malson byrjaði sína yrkisleið sum fótbóltsspælari í Torquay United, og í 2008 og 2009 umboðaði hann B36. Sambært Faroe Soccer spældi Sam Malsom 25 dystir fyri B36 og skoraði 7 mál.

# Flytingarvindeygað flytast

**FÓTBÓLTUR** Tað er óheppið, at fleiri spælarar kunnu fáa boð um lestrarmøguleika niðri tveir dagar aftaná, at flytingarvindeygað er latið aftur, so tí verður tað helst flutt næsta ár

Hilmar Jan Hansen

Flytingarvindeygað, sum er fýra vikur langa skotbráið, feløg hava til at keypa og selja spælarar mitt um summarið, liggur so óheppið fyri, at tað kann vera serstakliga óheppið fyri feløg, sum hava ungar spælarar, ið lúra eftir at sleppa niður at lesa.

– Sum er, letur flytingarvindeygað aftur 28. juli, men tey ungu, sum ætla sær niður at lesa, fáa ikki boð fyrr enn 30. juli. Vil illa til, kann eitt felag hava kanska tríggjar spælarar, sum fara avstað eftir ólavsøku, uttan at felagið hevur nakran møguleika at finna aðrar spælarar í staðin, sigur venjarin hjá B68, Bill McLeod Jacobsen.

Sjálvur hevur hann ikki henda trupulleika í ár, sjálvt um ein av hansara spælarum ætlandi fer niður at lesa. Tað er Poul N. Poulsen, men Bill sigur, at hóast hópurin hjá B68 kanska ikki er so breiður, hevur hann onkran at seta inn á plássið, Poul hevur røkt í landskappingini higartil.

– Men eg veit um onnur feløg, ið hava spælarar, ið ætla sær niður at lesa, so tað kann vera, at tað kemur illa við hjá onkrum av teimum, um tey ikki fáa handlað, tí flytingarvindeygað longu er latið aftur, sigur hann.



FLYTING

*Karl Vidtfeldt, formaður í kappingarnevndini hjá Fótbóltssambandinum, er sinnaður at viðgera møguleikan fyri at flyta flytingarvindeygað næsta ár, tí í ár er ov seint at gera nakað*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

### Verður eftirmett

Karl Vidtfeldt, formaður í kappingarnevndini hjá Fótbóltssambandinum, ásannar, at hetta kann geva summum feløgum ein trupulleika, men at tað tíverri ikki letur seg gera at broyta nakað í ár.

– Vit skulu í góðari tíð boða FIFA frá, nær okkara flytingarvindeygað er, so í ár broytist einki. Alla tíðina royna vit at taka hædd fyri teimum ymsu umstøðunum, ið ávirka, nær tað er best at hava flytingarvindeygað opið, men eg má viðganga, at henda trupulleikan hava vit ikki hugsað um, sigur hann.

– Men eg havi noterað mær hetta, so vit fara at taka tað upp, tá vit í heyst fara at eftirmeta hesa landskappingina, sum nú er í gongd. Er tað tá eitt ynski frá feløgunum um, at vit skulu flyta flytingarvindeygað, so tey ikki skulu brenna seg av, at spælarar møguliga sleppa inn at lesa niðri, vilja vit fegin gera tað og boða FIFA frá tí.

*hilmarjan@sosialurin.fo*



NÆSTAN Á MÁL

*Nýggi graslíkisvøllurin á Argjum er nú komin so langt, at eftir er bara at fylla sand og grønar perlur í hann, so hann kann takast í brúk týskvøldið í næstu viku, tá AB spælir ímóti EB/Streymi*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# Tríggir ólavsøkudystir

**VODAFONEDEILDIN** AB tekur samstundis nýggja graslíkisvøllin á Argjum í brúk, meðan HB og B36 langt um leingi eru blivin samd um, hvør teirra spælir nær á ólavsøku

Hilmar Jan Hansen

Argjamenn hava bíðað spentir eftir, at nýggi graslíkisvøllurin verður klárur, so teir hava eitt gott undirlag, nú farið verður av álvara aftur undir landskappingina í Vodafonedeildini. Og alt bendir á, at teir týskvøldið 27. juli klokkan 18 kunnu bjóða EB/Streymi vælkomin á Argjum.

– Vøllurin skuldi longu havt verið klárur leygardagin, men veðrið hevur ikki ordiliga verið til vildar, og tí hava menninir frá Polydan ikki fingið koyrt alla fylluna í. Men nú er bara eftir at fylla sand og onkrar grønar perlur í vøllin, sum allur er álagdur, so skuldi verið klárt, sigur Andrass Drangastein, formaður í AB.

– Gongst eftir vild nú, verður alt liðugt í síðsta lagi mikukvøldið, so spælararnir sleppa á vøllin at venja hóskvøldið. Nú er so lítið eftir, at vit vóna, at tað verður gjørt liðugt næstu dagarnar. Til vøllurin er klárur, verður vant í Gundadali.

Dysturin á Argjum er ein av trimum, sum verða spældir næsta týskvøld. Hinir báðir eru millum FC Suðuroy og ÍF í Vági og grannauppgerð millum NSÍ og B68 í Runavík.

### Funnu ikki semju

Tey bæði havnarfeløgini, HB og B36, hava eisini heimavøll í 16. landskappingarumfarinum, og tað er nakað síðani, at tey frá kappingarnevndini hjá Fótbóltssambandinum fingu at vita, at tað var í lagi, at teirra dystir blivu lagdir soleiðis, at annað liðið hevði heimadyst ólavsøkuaftan og hitt ólavsøkudag.

Men tað var ikki bara sum at siga tað, tí bæði vildu sleppa á ovara vøll í Gundadali at spæla ólavsøkuaftan, og ta einu løtuna stóð so fast, at feløgini vendu sær til kappingarnevndina fyri at fáa hana at skera ígjøgnum. Tað vildi kappingarnevndin kortini ikki, tí tað mátti vera upp til feløgini at finna útav.

Hóskvøldið kom so endiliga hvítur roykur úr samráðingarhølunum í Gundadali, og tá avtornaði, var tað HB, sum fekk dystin ímóti B71 ólavsøkuaftan klokkan 18.30, og B36 skal tí spæla sín dyst ímóti Víkingi ólavsøkudag klokkan 16.

Nú ólavsøka er, verða teir tríggir heimadystirnir hjá AB, HB og B36 í næstu viku eisini steypadystir.

*hilmarjan@sosialurin.fo*